# Skips- ella Maskinverkfrøðingur til Det Norske Veritas (DNV)

## www.dnv.fo



Vit søkja eftir einum sýnsfólki til fast starv hjá Det Norske Veritas í Føroyum.

Vit kunnu bjóða eitt spennandi og fjølbroytt starv í einari altjóða fyritøku við nógvum ymiskum uppgávum innan skips klassifikatión og øðrum líknandi uppgávum.

Møguleiki er eisini fyri arbeiði uttanlands í styttri ella longri tíð

Vit søkja ein verkfrøðing, helst við royndum innan sjóvinnu ella skipsídnað. Vit kunnu eisini veita upplæring til nýliga útlærdan verkfrøðing.

Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin kann samskifta á enskum, føroyskum og donskum. Arbeitt verður eftir altjóða leiðsluskipanum, og tað mesta av arbeiðinum fer fram á framkomnum IT skipanum..

Skrivstova okkara liggur á Vestaru Bryggju í Tórshavn, og leggja vit stóran dent á, at røkja okkara viðskiftafólk á ein professionellan hátt.

**Vit leggja dent á:**

- Flexibilitet
- Samstarv
- Trivna
- Álit
- Støðuga menning.

Vit kunnu bjóða tær eina góða løn við pensión og trygging eftir Skandinaviskum leisti.

Hevur hetta tín áhuga so send okkum eina umsókn við CV.

**Til Andrass.Joensen@DNV.com ella til:**

**Det Norske Veritas, Vestara Bryggja, 5 Hædd, FO-100 Tórshavn.**

Tørvar tær fleiri upplýsingar, ber til at venda sær til Andrass Joensen, Deildarleiðara á tlf 213750. Les um okkum á www.dnv.fo ella www.dnv.com

**Umsóknar freist: 11. juli 2008**

**DNV is unique. With us, you are constantly given challenges in your area of expertise and the opportunity to make an impact beyond business.**

Det Norske Veritas (DNV) is a global provider of services for managing risk. Founded in 1864, DNV is an independent foundation with the purpose of safeguarding life, property and the environment. DNV offers a truly international environment, comprising 300 offices in 100 countries, with 8.000 employees.

MANAGING RISK DNV




## Grafiskan trykkjara

Vit søkja eftir einum dugnaligum, útlærdum trykkjara at byrja skjótast til ber. Tú kemur at starvast saman við dugnaligum fólki í góðum umstøðum. Prentsmiðjan er útgjørd við eitt, tvey og fýra lits maskinum. Eisini verður ymiskt eftirarbeiði gjørt, so sum stans, preg o.l.

## Grafiskan trykkjaralærling

Hevur tú hug at fáa eina góða og litfagra útbúgving sum grafiskur trykkjari, so hevur tú møguleikan nú. Søkt verður eftir lærlingi at byrja skjótast til ber. Lærutíðin er 4 ár og ígjøgnum lærutíðina skalt tú á skúla í Danmark. Tú kemur at starvast í góðum umstøðum saman við dugnaligastu trykkjarum í landinum.

## Fólk til liðugtgerð

Vegna økt virksemi verður søkt eftir álítandi og dugnaligum fólki at arbeiða við liðugtgerð á prentsmiðju okkara. Tú kemur at arbeiða við at skera, pakka, gera blokkar, líma, hola og stifta. Eisini fevnir liðugtgerð um mappur og hefti.

Hevur tú spurningar, fæst meiri at vita við at ringja og spyrja eftir Sonju á Líðarenda, ella senda ein teldupost til estra@estra.fo.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 1. juli 2008.

estra®

Postrúm 10 FO-510 Gøta Tel. 478500 Fax 441673

Estra byrjaði at prenta í 1965 og hevur altíð lagt stóran dent á at hava vælútbúgvið fólk innan tey ymsu økini. Í 2005 varð Vasti, grafiskt virki í Klaksvík, keypt og hevur samtakið í dag 16 fólk í starvi.

Prentsmiðjan arbeiðir á føroyska marknaðinum og hevur ein sera stóran og breiðan kundaskara, har alt frá visitkortum til bøkur og krevjandi litprent verður prentað.

Estra arbeiðir støðugt við at menna seg sum prentsmiðju og lýsingarstovu. Umframt eina framkomna prentsmiðju, hevur Estra lýsingastovu, ið veitir ráðgeving innan marknaðarføring, sniðgeving, ráðgeving og uppseting av bókum, lýsingabløðum, faldarum og øðrum prentlutum. Estra setir altíð kundan í hásæti og leggur størsta dentin á góðsku og veitingartryggleika.

# Sosialurin í Sosialurin

RINGIÐ TEL 312 000 OG FÁIÐ EITT ÓBINDANDI TILBOÐ



JÄSPI-ketilin er kendur í Føroyum. Við mest seldum ketlum á føroyska marknaðinum nýtist ikki at siga meira...

JÄSPI-ketilin fáa tygum hjá Mariu Poulsen.

JÄSPI®

**Maria Poulsen**

Tel 312 000 | Fax 315 970 | mp@mp.fo | www.mp.fo